# Vit burdu verið fleiri føroyingar

**FÓTBÓLTUR Atli Danielsen er heldur, at fleiri føroyingar áttu at spælt í næstbestu donsku fótbóltsdeildini. – Hyggja vit bara eftir ÍF Føroyum, eru fleiri leikarar, ið kundu spælt seg inn í hópinum hjá einum donskum 1. deildar felag, sigur hann**

Rólant Waag Dam

Bakka vit eitt ár aftur í tíðina, taldi næstbesta deildin í Danmark fýra føroyingar. Men BK Frem flutti niður og Jónas Þór Næs, Bogi Løkin og Andreas Lava Olsen fluttu heim. Teir báðir fyrstnevndu eru síðani farnir til Íslands, men undir øllum umstøðum er Atli Danielsen einsamallur føroyingur í næstbestu donsku fótbóltsdeildini.

Tað undrar hann eitt sindur, tí fleiri føroyingar eftir hansara tykki hava evnini til donsku 1. deild.

– Hjá leikarunum heima í Føroyum vigar fíggjarligi parturin helst nógv, og tú kanst ikki rokna við at fáa tað sama tey bæði fyrstu árini í næstbestu deildini, sum tú kanst fáa í onkrum føroyskum felag. Tú mást prógva títt virði áðrenn, sigur Atli Danielsen og heldur áfram.

– Vit venja einaferð um dagin og allir, sum eg higartil havi spælt saman við, hava annaðhvørt gingið í skúla ella havt eitt arbeiði aftrat, so tað átti at borið væl til at knýtt fótbóltin í næstbestu donsku deildini saman við eitt nú lesnaðinum, sigur Atli Danielsen, sum sjálvur hevur lisið búskap alla ta tíðina, hann hevur spælt í Danmark.

## Fíggjarkreppan svíir

Hann vísir tó á, at tað ikki er lætt at fáa ein sáttmála við nakað danskt 1. deildarfelag nú. Sáttmálarnir hanga ikki á trøunum og tað eru sera nógvir sáttmálaleysir danskir fótbóltsspælarar í løtuni, tí fíggjarkreppan hevur havt við sær, at liðini hava skert um talið av leikarum í hópinum.

Kortini metir hann, at fleiri føroyingar høvdu havt – um teir altso ynsktu tað – møguleika fyri at gjørt seg galdandi í næstbestu donsku fótbóltsdeildini.

– Vit burdu verið fleiri føroyingar her. Ja, hyggja vit bara eftir ÍF Føroyum, so hevur tað liðið fleiri leikarar, ið kundu spælt seg inn í hópinum hjá einum donskum 1. deildar felag. Rókur av Fløtum Jespersen og Marni Djurhuus eru tveir úr tí hópinum, sigur Atli Danielsen, ið als ikki útihýsir, at har eru fleiri aðrir mans, ið kundu staðið seg.

Teir báðir leikararnir, Atli Danielsen nevnir, spældu báðir stóran part av seinnu hálvu við ávíkavist HB og EB/Streymi, samstundis sum teir eru lesandi í Danmark. Men spælir tú í næstbestu donsku deildini, først ber ikki til at spæla fótbólt í Føroyum samstundis, vísir Atli Danielsen á.

– Hinvegin burdi tað verið nógv meira avbjóðandi at spælt í 1. deild í Danmark, har tú hvørt vikuskifti spælir í móti liðum sum Vejle, Viborg og AGF, heldur enn at møta FC Suðuroy og NSÍ. Og hevur tú málsetningar um at liva av fótbóltinum, so er næstbesta danska fótbóltsdeildin eitt nógv betri útgangsstøði enn besta føroyska deildin, metir Atli Danielsen.

# Atli betur fyri enn nakrantíð

**FÓTBÓLTUR Góðkent! Tað er skoðsmálið, Atli Danielsen gevur fyrru hálvu hjá FC Roskilde, sum nú er farið í vetrarfrí. – Men persónliga havi eg ment meg nógv sum fótbóltsleikara hetta hálvárið, sigur Atli Danielsen**

Rólant Waag Dam

Tað byrjaði illa. Trý tap á rað og tað skuldu ganga seks dystir, áðrenn liðið vann fyrsta dystin. Men so kom av álvara glið á, og í átta dystir á rað tapti FC Roskilde ikki.

– Hesir dystirnir hava verið hæddarpunktið hetta hálvárið, sigur Atli Danielsen

Av tí sama kann hann eisini siga 'góðkent', um kappingarárið higartil, men so heldur ikki meiri enn tað. Fýra teir seinastu dystirnar er alt steðgað upp. Tvey tap í móti toppliðum og so eitt tap og ein javnleik í móti botnliðum, er ikki lang frá nøktandi.

## Mentur persónliga

Hinvegin kann Atli Danielsen illa vera annað enn nøgdur við sítt egna avrik hetta hálvárið. Fyrsta landskappingardystin var hann leikbannaður og tað sama var galdandi seinast, liðið spældi. Annars er hann byrjaður inni hvønn dyst á miðvøllinum, har hann hevur ein sentralan leiklut.

– Eg merki sjálvur, at tað hevur gingið rímiliga væl og kenni meg sum ein umráðandi part av liðnum, greiðir Atli Danielsen frá. Hann hevur hug at geva venjaranum ein part av æruni av hesum.

– Hann eigur rós uppiborið og eg haldi, at eg persónliga havi ment meg hetta seinasta hálva árið, soleiðis at eg eri ein betri fótbóltsleikari nú, enn eg havi verið, heldur Atli Danielsen.

Sjálvur heldur hann, at hann tekur størri lut í uppbyggjandi spælinum og torir at taka fleiri kjansir nú.

– Eg havi verið rímiliga defensivur og altíð valt tryggu loysnina við at spæla bóltin aftur eftir. Nú eri eg djarvari, vendi mær og finni áleypararnar, greiðir Atli Danielsen frá.

Fyri tveimum árum síðani varð Atli Danielsen annars kosin ársins leikari í Frem, men Atli Danielsen er ikki heilt tann sami leikarin longur.




*Umframt at hava spælt við FC Roskilde hevur Atli Danielsen spælt við BK Frem í Danmark, Sogndal í Noreg og – sjálvandi – KÍ í Føroyum*

– Har var eg meira at rokna sum ein uppruddari, og skuldi nokk ikki hugsa so nógv frameftir. Síðani eri eg mentur taktiskt og havi fingið nýggj ting við í mítt spæl, sigur Atli Danielsen.

## Skjótt klárur til landsliðið

Tað eru fáir føroyingar, sum hava havt møguleika at fylgt hesari menningini hjá Atla Danielsen. Fyrst og fremst tí, at hann spælir í Danmark, men harnæst gav miðvallarleikarin úr Klaksvík eisini avboð til landsliðið fyrst í september.

– Tað var rætt og slætt ein spurningur um, at eg ikki kundi missa meira av skúlanum, har vit hava havt sera nógv um oyruni. Í januar hava vit nakrar royndir, men so skuldi stilna av og eg ætli mær at melda meg tøkan og stríðast fyri at vinna meg inn aftur í landsliðshitan, greiðir Atli Danielsen frá.

## Ógreið framtíð

Men eitt er landsliðið og annað er framtíðin í Danmark. Atli Danielsen hevur lisið búskap síðani hann kom til Danmarkar í 2007. Hetta verður hann liðugur við komandi summar.

– Spurningurin er so, hvat tá hendir. Kona mín verður eisini liðug við sítt tá, so vit eru bæði liðug í so máta. Mín sáttmáli við FC Roskilde gongur fram til summarið 2012, men eg havi tryggjað mær, at eg kann fara heim longu í summar, um eg ynski tað. Lesnaðurin bindir okkum í øllum førum ikki tá, men vit vita ikki heilt, hvat vit ætla, sigur Atli Danielsen.

rolant@sosialurin.fo